Vilja broyta lógina um sílaveiðu

Føroya Sílaveiðufelag hevur sent skriv til Løgtingið, har biðið verður um at lógin um sílaveiðu í Føroyum verður broytt

Í skrivinum sigur Sílaveiðufelagið millum annað:

Føroya Sílaveiðufelag vendir sær við hesum til háttvirda Løgting við umsókn um at fáa broytt galdandi lóg um sílaveiði í Føroyum frá 14. apríl 1893 við seinni broytingum. Við økt ari fritíð hjá fólki yvirhøvur, og teimum nógv batnaðu samferðslu møguleikunum, er eisini hugur og umstøðurnar til at gera brúk av hesi fritíð til ítrótt, útferðir í náttúru, og ann að í hesum sambandi. Soleiðis merkist hetta eisini í tí stóra áhuga fyri síla- og laksaveiði.

Umráðandi er tí fyri at verja um tann stovn vit eiga av sílum, og nú tað vísur seg at laks urin kann støðast her, má farast varliga um hann fyrstu árini.

Galdandi lóg hevur víst seg at hava brek, og fútin hevur eisini í brævi til Landsstýrið dagf. 20.10-65 gjørt vart við at so er, tí tað við sakarmálum hevur víst seg torført, fyri ikki at siga ógjørligt, at døma teir ákærdu.

§ 1 í gomlu lógini bannar øll veiðiamboð uttan húk. Hetta vísir seg at vera óheldig forðing, tí tað er nógva staðir vorð ið vanligt at pilka síl og laks útfyri ósum, og verður soleiðis nógvur fiskur uppskræddur, utt an at verða veiddur. Eisini verð ur seinasta pettið í somu lóg argrein mangan misskilt, tí hild ið verður at reglan um at síl og laksur undir 25 cm. ikki skulu drepast, men sleppast út aftur, bert er galdandi um tey eru fingin í garni ella nót, og gloymt verður at fyrsta pettið í somu lógargrein sigur, at bert má veiðast við húki. Hetta hava vit broytt í nýggja upp skotinum, soleiðis at vit vóna, at misskiljingar ikki skulu fyri koma. Somuleiðis hugsa vit okkum eisini, at minstamátið fyri veiði av sjósílum og laksi verður sett til 30 cm.

Fyri ikki misskiljingar skulu standast av reglunum um nótakast og setan av gørnum, sum felagið helst vildi verð bannað heilt á slíkum støðum, halda vit tað vera rættast at hava so stóran fjarleika frá ósa, at tað gerst so tvørligt sum møguligt at nýta tílíkan reiðskap nærhendis teimum stóru áunum Av tí at tað ofta vísir seg at sett verða gørn fram við landi, og sagt verður, at hetta eru seiðagørn, sjálvt um eyðsæð er, at sett verður eftir sílum, sum jú oftast ferðast fram við landi num, hava vit í nýggja upp skotinum sett, at seiðagørn skulu ikki setast nærri enn 10 metrar frá landi á fjøru. Vit kunnu upplýsa, at pláss ið fyrr hava verið góð sjósílaplárs eru so at siga avoydd fyri síl, av tí at sokallaði seiðagørn støðugt standa fram við landinum alt summarið.

Við grein 8 í uppskotinum gerst møguligt at friða ávís økir, um hetta verður hildið neyð ugt, uttan at skula fara til ting lið í hvørjum einstøkum fori, um slík ynski koma fram.

§ 2 í gomlu lógini hava vit eisini broytt samsvarandi § 9 í uppskoti okkara, fyri at fyribyrgja, at tað skal loysa seg at veiða størri nøgd av sílum og laksi ólógliga og síðani selja við vinningi, tí ein kann rokna við at gjalda minstu sekt, um ein verður tikin og dømdur.

Føroya Sílaveiðifelag er til eina og hvørja tíð til reiðar at møta til samráðingar í sambandi við hesa umsókn felagslins, sum vit vóna fær góða und irtøku, soleiðis at vit til heystar fáa eina munandi betri lóg um síla- og laksaveiði í Føroyum.

Við brævinum leggur felagið uppskot til nýggja lóg um síla- og laksaveiði í Føroyum.

Vit hava altíð á goymslu alt tilfar til
blikksmíð
sanitet
hitaverk
DEMICH
Tlf. 1072 - Tórshavn
Verður sent um alt landið

Spinnið í Gøtu
tygum fáa gott tógv, og skjóta avgreiðslu.
Vit keypa óvaskaða og vaskaða ull og selja øll slóg av føroyskum tógvi.
TØTINGARVIRKIÐ
v/ Ólavur Gregersen — tlf. 20 í Gøtu

FÆRØSK MARGARINE
Vita No 1
VITAMINISERET
FÆRØSKT PRODUKT FINT PRODUKT

RESTORFFS PILSNARØL


sjálvandi

FØROYA
BANKI
banki FØROYA

Tíðindi eystaneftir

Moskva 17.7.69. (APN)

Bajkal skal friðast

Ein nevnd av serfrøðingum er farin til tann viðgitna Bajkalsjógvin í Eystursibir fyri at kanna eftir, hvussu Bajkal og alt økið rundan um sjógvin kunnu verða friðað og umskipast til eitt slag av veldugari viðalund. Her sum so nógva aðrastaðni er tað ídnaðurin, ið vil spilla nátúrina.

Olja úr íshavinum?

Hugsanin um, at stórara nøgdir av olju og gassi eru at finna undir íshavinum, verður nú stimbrað av úrslitunum av einari royndarboring á Jamalhálvoynni við munnan á Obánni. Henda boring gevur nú 400 tons av olju um dagin, og menn hava funnið fram, at olju- og gassnøgdirnar undir hálvoynni toyggja seg út undir Karahavið. Enn er eingin boring roynd norðan fyri Jamalhálvoynna, og tí er tað enn ov tíðliga at siga nakað um, hvørji úrslit kunnu væntast. Størstu trupulleikarnir voldir tað harðbalna veðurlagið. Summir serfrøðingar halda, at trupulleikarnir eru so stórir, at neyðugt er at bíða til eina ferð langt úti í framtíðini, meðan aðrir siga, at nøgdirnar av olju á hesum leiðum helst eru so stórar, at tær fara at kunna endurrinda heilt stórar íleggingar.

Fleiri og betri handlar í Moskva

Tvey av teimum størstu vøruhúsunum í miðbýnum í Moskva byrja í ár at selja við sjálvavgreiðslu (sjálvtøku), og tað sama gera 10 aðrir handlar har í býnum. Tailð á matvøruhandlum í Moskva veksur í ár við einum triðingi, og sølan av liðugt pakkaðum vørum væntast at veksa heilt nógv. Í alt fær Moskva o.u. 200 nýggjar handlar í ár.

Mótasýning - fyri arbeiðsklæðir

Í Moskva verða í løtuni sýnd fram ymisk uppskot til meiri høskandi arbeiðsklæðir. Upphavsmenninir halda sum so, at tey klæðini fólk eru í, tá tey arbeiða, hava minst líka stóran týdning, sum fritíðarklæðini. Á framsýningini eru 24 uppskot til betri, sterkari og snøggari arbeiðsbúnar til øll møgulig fak, til ymist veðurlag, til arbeiði undir jørð, til arbeið úti og innj osfr.

Húsabygging í Moskva

Húsabyggingin í Moskva er í ár størri enn nakrantíð fyrr hesi seinastu 15 árini. Bygt verður í øllum býnum innan fyri ringmotorvegin, sum er 109 km. langur. Niðurtøkan av gomlum húsum hevur ongantíð verið so stór sum hesi bæði seinastu árini: 3500 gomul hús við samanlagdari gólvfløtu uppá 500.000 kvm. eru burturruddað. Í staðin verða bygd hús við 9—16 hæddum og skúlar og barnastovnar. Nýggju húsini standa ikki so tætt sum tey gomlu, gott plárs verður til gøtubreiðkingar, tún og parkir. Í januar 1969 var samanlagda íbúanøgdin í Moskva 1.750.000 íbúir, og ætlanin er, at henda nøgd skal veksast til 2,5 mill. íbúir. At hetta fer a bera til, sæst av byggiferðinj hesi seinastu tvey árini: 240.000 nýggjar íbúir.

Sovjettisk húsabygging er ídnaðarlig. Stórar verksmiðjur gera lidnar húsblokkar, sum verða samansettir av risastórum byggikranum.

Nú verða húsini ofta bygd hægri enn tær 5 hæddirnar, sum fyrr vóru vanligar. Umframt húsabyggingina fær Moskva nú eina nýggja breiða høvuðsgøtu, sum skal binda miðbýin saman við triggjar tær størstu jarnbreytastøðirnar.

